Gjalda ov nógv fyri fjarhitan

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í Hoyvík hevur roknað seg fram til, at fólk gjalda ein fjórðing ov nógv fyri fjarhitan. Harafturat heldur nevndin, at bæði íbindingargjaldið og fasta gjaldið eru órímulig

EYÐUN KLAKSTEIN

Fjarhitafelagið tekur ov nógvar pengar teimum sum brúka fjarhita, og grundgevingarnar fyri teimum ymsu gjøldunum eru bæði óhaldbarar og skiftandi.

Hetta førir fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í Hoyvík fram í fýra notatum, sum Sosialurin hevur fingið hendur á. Notatini eru skrivað til fundin, sum skal vera millum fjarhitanevndina og borgarstjóran í Havn seinnapartin í dag.

– Vit finna okkum ikki í, at fjarhitaveitarin, sum hevur fingið monopolstøðu upp í hendurnar frá býráðnum, brúkar skiftandi óhaldbarar grundgevingar og leysar pástandir fyri sínum kappingarføri, sigur fjarhitanevndin í skrivi til borgarstjóran í Havn.

– Eftir okkara tykki er tað Tórshavnar býráð, sum hevur skyldu at tryggja áhugamálini hjá brúkarunum í fjarhitaspurninginum. Vit venda okkum tí við hesum til Tórshavnar býráð við kravi um at fáa prísviðurskiftini í rættlag, sigur fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum Millum Gilja, Eystan Gil, Lítla Gil og Inni á Gøtu, har fjarhitin verður brúktur.

Tað eru Tórshavnar býráð og SEV, sum eiga hvør sína helvt í Fjarhitafelagnum.

Prísurin fyri fjarhitan, sum kemur frá brennistødini á Sandvíkarhjalla, er ov høgur sammett við oljuna, sigur fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í Hoyvík

Krevja eina loysn

Fyri umleið tveimum vikum síðani fingu tey, sum brúka fjarhita frá Fjarhitafelagnum, stóra eykarokning fyri nýtsluna í ár. Orsøkin er, at hóast fjarhitin als ikki er tengdur at oljuprísinum, leggur Fjarhitafelagið sín prís eftir oljuprísinum.

Men sambært fjarhitanevndini hjá eigarafeløgunum er prísurin á fjarhita settur ov høgt sammett við oljuprísin, og fjarhitanevndin hevur farnu trý árini arbeitt við at fáa síni sjónarmið ígjøgnum – tó uttan úrslit.

Nú krevur fjarhitanevndin, at Tórshavnar býráð kemur upp í málið fyri at tryggja áhugamálini hjá teimum sum brúka fjarhita.

– Vit krevja, at ítøkilig stig verða tikin beinanvegin, so at ein loysn kann verða funnin á ósemjuni millum Fjarhitafelagið og brúkararnar. Antin verða prísirnir rættaðir ella fáa brúkararnir fullgóðar grundgevingar fyri, at prísurin livir upp til lyftið um, at tey, sum brúka fjarhita, ikki skulu gjalda meira hitan, enn tey sum brúka olju, sigur fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í skrivinum til borgastjóran í Havn.

Gjalda ein fjórðing ov nógv

Í teimum fýra notatunum, sum fylgja við skrivinum til borgarstjóran í Havn, ger fjarhitanevndin greitt, hví hon heldur, at prísurin fyri fjarhitan, íbindingargjaldið og fasta gjaldið eru sett ov høgt.

Fjarhitanevndin sigur seg góðtaka, at fjarhitaprísurin verður lagdur eftir oljuprísinum, men nevndin vísir á, at Fjarhitafelagið tekur ov nógvar pengar fyri fjarhitan sammett við oljuna. Fjarhitafelagið hevur roknað seg fram til, at orkutapið í oljufýrdum anleggum er nógv størri enn í fjarhitaanleggum, og tí skulu fjarhitabrúkarar gjalda 43% meira fyri fjarhitan, enn fólk gjalda fyri olju.

Fjarhitanevndin hevur gjørt sínar egnu útrokningar sum vísa, at orkutapið á oljufýringum er bara 14% meira, enn tá talan er um fjarhita. Tí heldur fjarhitanevndin, at brúkararnir gjalda ein fjórðing ov nógv í nýtslugjaldi fyri fjarhita.

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum hevur skotið upp, at ein óheft kanning verður gjørd at nýtslugjaldinum, men hetta vildi Fjarhitafelagið ikki hoyra talan um.

Ov høgt íbindingargjald

Eisini tá talan er um íbindingargjaldið eru Fjarhitafelagið og brúkararnir ósamdir um um prísin.

Fjarhitafelagið tekur eitt íbindingargjald, sum skal svara til tað sparingina, sum tað er av at seta ein hitavekslara upp og ikki eina oljufýring, ketil, tanga og skorstein.

Hesa sparing metir Fjarhitafelagið er 25.500 krónur, men fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum hevur kannað prísir og er komin fram til, at munurin er bara umleið 12.000 krónur. Tí heldur nevndin, at Fjarhitafelagið tekur góðar 13.000 krónur ov nógv í íbindingargjaldi.

Og sum tað seinasta vísir fjarhitanevndin á, at fasta gjaldið verður ásett uttan at nøkur tænasta verður latin afturfyri. Sambært Fjarhitafelagnum skuldi fasta gjaldið svara til tað, sum fólk gjalda fyri oljufýrtænastu, men hóast brúkarar av fjarhita gjalda eitt árligt gjald til Fjarhitafelagið fylgir eingin tænasta við.

Fjarhitafelagið hevur seinni víst á, at hetta gjaldið skal viga upp fyri, at fólk brúka meira pláss til oljufýring enn til hitavekslara, og tí skulu fjarhitabrúkarar gjalda fyri hesa sparing. Men hesa grundgeving við fjarhitanevndin als ikki góðtaka.

Álvarslig støða

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum er sera misnøgt við viðferðina, sum brúkarar hava fingið frá Fjarhitafelagnum, og nú roynir fjarhitanevndin at fáa borgarstjóran at leggja uppí.

Fjarhitanevndin saknar haldgóðar grundgevingar fyri príspolitikkin hjá Fjarhitafelagnum, og nevndin krevur at fáa hesar grundgevingar ella at fjarhitaprísurin verður settur niður.

– Fyri brúkararnar er tað ein álvarslig støða, at vit ikki kunn treingja ígjøgnum við okkara sjónarmiðum, men vit kenna, at vit hava eina góða sak at stríðast fyri, og tí eru vit á onga hátt sinnað at sleppa málinum, sigur fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í skrivinum til Leiv Hansen, borgarstjóra í Havn.

Seinnapartin í dag verður fundur millum borgarstjóran og fjarhitanevndina hjá eigarafeløgunum um málið.

ROTTUR Á LOFTINUM?

Nýggj kunningartænasta til Havnafólk. Her fært tú nærri at vita um byggiloyvi, dagstovnar og hegnskyldu - snøgt sagt kunning um allar tænastur og øll tilboð til fólk í Tórshavnar kommunu. Ring 31 51 60 ella kom inn í avgreiðsluna við Vaglið.

SNARSKIVAN
- greið boð um Havnina

stephansons hús

Ógreitt við ráðharrasamráðingunum

Ætlanin var, at danskir ráðharrar og føroyskir landsstýrismenn skuldu hittast til samráðingar um fullveldismálið undan formellu samráðingunum 26. okotber, men enn eingin fundur avtalaður

JOHN JOHANNESSEN

Enn er eingin dagur settur av til ávegis nakran ávegis samráðingarfund millum danskar ráðharrar og føroyskar landsstýrismenn undan fullveldissamráðingunum 26. november.

Løgmaður og danski forsætisráðharrin hava avtalað, at danski búskaparmálaráðharrin, Marianne Jelved, og føroyski landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, skulu hittast at samráðast um gjaldoyrasamstarv, somuleiðis sum danski løgmálaráðharrin, Frank Jensen, og føroyski landsstýrismaðurin í lógarmálum, Høgni Hoydal, skulu hittast at samráðast um umsitingarligt samstarv og borgararættindi.

Men hóast tað nú bert eru góðar tvær vikur eftir til fjóðra umfar í fullveldissamráðingunum, er eingin fundur avtalaður.

Harafturat skilst á løgmanni, at roknast kann við, at fundurin millum Marianne Jelved og Karsten Hansen um gjaldoyrasamstarv verður av ongum.

Fólkatkvøðan kom í vegin

Danska fólkaatkvøðan um evruna hevur seinastu mánaðirnar tikið nógva tíð og orku frá donskum politikarum. Av somu orsøk hevur danska stjórnin ikki havt stundir at hugsa um ríkisrættarligu samráðingarnar við føroyingar.

Tí var ynskið frá donsku stjórnini, at fjóðra umfar av samráðingunum ikki skuldi haldast fyrr enn aftan á donsku fólkaatkvøðuna. Og fyri at gera sjálvan samráðingarfundin lættari, skjeyt danski forsætisráðharrin upp, at ávegis samráðingar skuldu haldast millum danskar ráðharrar og føroyskar landsstýrismenn.

Hesar samráðingar helt danski forsætisráðharrin vera umráðandi at hava sum skjótast eftir donsku fólkaatkvøðuna, men hóast tað hósdagin eru tvær vikur síðani evruvalið, eru eingin er eingin fundur avtalaður.

Tað einasta, sum er komið fram, er, at tað er óvist, um nakar fundur verður millum Marianne Jelved og Karsten Hansen. Orsøkina til hetta heldur Anfinn Kallsberg, løgmaður, vera, at úrslitið av donsku fólkaatkvøðuni gjørdist eitt nei til evruna.

– Tá danir varðveita krónuna sum danskt gjaldoyra, og vit framvegin ynskja at vera í gjaldoyrasamstarvi við Danmark, er ikki so nógv, sum skal avgreiðast millum partarnar innan gjaldoyrasamstarvið, sigur Anfinn Kallsberg.

Fundurin ikki útsettur

Hóast tað nú er farið at tátta í við tíð til fjóðra umfar í fullveldissamráðingunum og ongar ávegis samráðingar enn eru settar á dagsskránna, roknar løgmaður ikki við, at samráðingarfundurin 26. november verður útsettur.

Landsstýrið arbeiðir áhaldandi við fyrireikingunum til fundin, sum skal hann vera til ásetta tíð, og landsstýrið er komið so mikið áleiðis, at ein skabelón til eitt samráðingarupplegg er liðug.

Løgnaður ásannar, at alt er ógvuliga óvist við ætlaðu ávegis samráðingunum, men tað skilst á honum, at hann hevur tosað við danska forsætisráðharran um hetta, og at ein loysn er á veg.

Lagnan hjá Tórbjørn avgjørd í vikuni

Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, skal í hesi vikuni á fund við sýslumannin í Eysturoynni um ákæruna móti honum. Eftir hendan fundin fer Tjóðveldisflokkurin at viðgera støðuna hjá landsstýrismanninum



JOHN JOHANNESSEN

Einaferð í hesi vikuni fær Tórbjørn Jacobsen at vita frá sýslumanninum í Eysturoynni, hvør avleiðingin verður av, at hann sigldi á land við skipi sínum, Halgafelli, í Noreg 11. januar í ár.

Sýslumaðurin og landsstýrismaðurin hava avtalað at hittast einaferð í vikuni, tá tað liggur fyri. Hvat úrslitið av hesum fundinum verður, er ikki greitt enn, men Sosialurin veit um líkandi ákærur, ið hava fört til bót á 5.000 krónur.

Tórbjørn Jacobsen er ákærdur fyri, at hann ikki hevð útsýnismann á brúnni hesa náttina, óhappi hendi.

Tjóðveldisflokkurin hevur fund um støðuna hjá Tórbjørn Jacobsen so skjótt, Tórbjørn Jacobsen hevur tosað við sýslumannin. Tó er ikki hugsandi, at málið fer at fáa politiskar avleiðingar fyri landsstýrismannin.

Kommunuvalið lýst

Løgmaður lýsti í gjár formliga, at kommunuvalið í ár verður týsdagin 21. november

JOHN JOHANNESSEN

Tað er nú endaliga greitt, at kommunuvalið verður týsdagin 21. november.

Løgtingið samtykti endaliga fríggjadagin uppskotið broyting í lógini um kommunuval og í gjár lýsti løgmaður formliga, at kommunuvalið verður 21. november.

Løgmaður ger eisini vart við, at valevnislistarnir skulu latast valnevndarformanninum í avvarandi kommunu ella kommununi, og skal hetta í seinsta lagi verða gjørt týsdagin 31. oktober klokkan 18.

VETRARTILBOÐ við Norrönu

Bilpakkar Føroyar - Danmark ella hinvegin

	4-koyggju kamar v. wc/bað	2-koyggju kamar v. wc/bað	Luksus kamar
Bilur + 4 fólk	3.640,-	4.620,-	6.940,-
Bilur + 3 fólk	2.920,-	3.660,-	
Bilur + 2 fólk	2.210,-	2.700,-	3.860,-

Fyrsta fráferð er fríggjadagin 13. oktober.

Frítíðarhúsv/Sypmarhús:
Danland í 1 viku 2 vaksin & 2 børn í bili ár 4.995,-
Dansk Folkeferie í 1 viku ár 5.995,-

Hotel:
Hotel Excelsior í 1 viku - Keypmannahavn fyri hvonn, við 2 ferðandi í bilinum ár 3.795,-
Park Hotel í 1 viku - Alborg ár 3.350,-

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
E-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.com